# Two Weeks Notice

Um tú ikki vilt síggja eina romantiska komediu, so skalt tú ikki fara at hyggja eftir »Two Weeks Notice«.



Filmurin er ein romantisk komedia, so tað baskar – ikki so nógv nýtt í tí, men í eini samanseting av Hugh Grant og Sandra Bullock er lagt upp til nakað serligt.

Grant er júst sum hann eigur at vera: ríkur og sjarmerandi, hvørt meira enn annað. George Wade, sum Hug Grant eitur í filminum, eigur saman við beiggja sinum, Wade Corporation. Eitt felag, sum hevur til endamáls at forvinna pening. Beiggi George, Howard, er heilin aftanfyri felagið, meðan George er andlitið úteftir. Hann er sjarmerandi og vakur, og harafturat, dugir hann tað sindrið hann skal: vera á bíløtum og halda talur.

Lucy Kelson er júst tað øvugta. Hon er ein mótstandari av nógvum av arbeiðnum Wade brøðurnir gera. Hon er ung, vøkur, útbúgving sakførari á Harvard og arbeiðir á rættarhjálpini. Lucy hevur mál og mið, og hvat hon gongur inn fyri.

George fær til uppgávu at seta ein sakførara í starv, sum hevur prógvantin frá Yale ella Harvard, og tað varð straks verri, tí George hevur nevniliga hug at lata tey ytru virðini koma framum nakað annað.

George hittir av tilvild Lucy, sum jú livir upp til strongu krøvini. Trupulleikin er bara tann, at Lucy als ikki er áhugað í at arbeiða fyri Wade Corporation og George. Hon er í veruleikanum í holt við at forða felagnum í at ríva ein gamlan íbúðarbygning niður, so pláss verður fyri eigaraíbúðum.

Tá George lovar henni, at íbúðarbygningurin verður standandi, og at um hon velur at arbeiða fyri Wade, so gerst hon stjóri fyri vælgerðarfelagnum hjá teimum.

Hetta kann Lucy ikki siga nei til, men tð hon ikki visti av var, at arbeiðið var ikki bara at vera sjefadvokatur. Nei, tað inniheldur eisini at klára hjúnarskilnaðin hjá George, at velja honum klæðir, at tosa í telefon við hann mitt um náttina, at velja honum brævpappír og annað fjas, ið onki hevur við sakføraraarbeiði at gera. Skjótt gerst tað ov nógv og Lucy sigur upp – við 14 daga ávaring.

George, sum nú er vorðin avhengigur av Lucy, vil treyðugt lata hana fara, men at enda játtar hann, men Lucy skal finna sín egna avloysara áðrenn hon fer. Unga, vakra og ambitiøsa June fær starvið, og tað vísir seg skjótt, at tað er ikki bar astarvið hon vildi hava. George er hennara næsta mál.

Alt skuldi nú verið í lagi, og Lucy kann byrja aftur við sínum egna arbeiði á Rættarhjálpini.

Men man okkurt ikki vera, sum býr undir øllum tí, sum hon og George hava havt til felags seinasta árið? Men so er spurningurin bara um tað er ov seint.

Hugh Grant og Sandra Bullock rigga væl í leiklutunum sum George og Lucy. Hetta er ongin djúpur filmur, sum gevur tær nakað at hugsa um, men tú sært Hugh og Sandru í sínum rætta elementi.

So um tú hevur hug at flenna, so er at fara at hyggja eftir »Two Weeks Notice«, tí látur er heilt vist á skránni.

**Fakta um <Two Weeks Notice>**

| | |
|---|---|
| leikarar: | Sandra Bullock, Hugh Grand, David Haig, Alicia Witt, Dana Ivey o.o |
| longd: | 101 min. |
| stað: | havnar bio |

# HENDURNAR UPP ELLA BUKSURNAR NIÐUR





## #4 Jens Tummas Næss:

**01. Kall ella Føroya Tele?**
- Føroya Tele

**02. Jolly ella Coca Cola?**
- Coca Cola

**03. Rás 2 ella Útvarp Føroya?**
- Útvarp Føroya

**04. Quality Street ella Roses?**
- Quality Street

**05. Siemens ella Nokia?**
- Nokia

**06. Loysing ella samband?**
- Loysing

**07. Flúgva ella sigla?**
- Flúgva

**08. Føroya Bjór ella Restorff?**
- Føroya Bjór

**09. Fótbóltur ella hondbóltur?**
- Fótbóltur

**10. Dimmalætting ella Sosialurin?**
- Sosialurin

**11. Tomat ella agurk?**
- Tomat

**12. Svart ella hvítt?**
- Svart

**13. Pizza ella grill?**
- Grill

**14. Fløgu, plátu ella band?**
- Fløgu

**15. Kaffi ella te?**
- Kaffi

**16. Jakka ella frakka?**
- Jakka

**17. Lissur ella karalás?**
- Lissur

**18. Rock ella popp?**
- Rock

**19. Mamma ella babba?**
- Mamma

**20. MacIntosh ella PC?**
- PC

**21. Per ella Poul?**
- Pól

**22. Um tú vart ein bilur, hvat slag skuldi tú so verið?**
- Um tað er mítt dreymaeg, so skuldi tað verið ein Ferrari, men um tað er mítt veruliga eg, so má tað verða ein gamal uppslitin Morris Mini.

**23. Hvør skuldi so sloppið at koyrt teg, og hvør skuldi als ikki sloppið at koyrt?**
- Konan skuldi altíð sloppið at koyrt, men Margretha Drotning hevði ikki sloppið, tí eg vænti ikki, at hon dugir at koyra

# ítróttur

Nr. 39 • mikudagur • 26. februar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Komandi dystir

**Hondbóltur**

1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 26.02 | 19.00 | StÍF-Tjladur |

1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 26.02 | 20.00 | H71-Tjaldur |

ÍF-Mjølnir 3-2 (21-25, 25-22, 25-16, 19-25, 15-9)

# Eingin avgerð



*Við sigrinum á Mjølni helt ÍF fast um FM-møguleikan í bestu kvinnudeildini, har trý lið nú øll tykjast standa við eins góðum møguleikum undan seinastu umførunum*

**ÍF sendi spenningin í FM-stríðnum í hæddina, tá tær vunnu heimadystin á Mjølni**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Mjølnir hevði møguelikan at mest sum vissa sær FM-gullið, tá tær vitjaðu á Kambsdali sunndagin. Við einum sigri vildi munurin niður til næstu liðini í øllum førum verði somikið stórur, at sjálvt við einum tapi í trupla útidystinum móti TB um tvær vikur hevði Mjølnir framvegis havt lagnuna í egnum hondum.

Tað merkti so eisini, at fyri ÍF var hetta avgjørt seinasti møguleikin at halda fast í oddinum, og tað var so eisini hetta, sum tær megnaðu.

ÍF vann nevnliga ein sera spennandi dyst 3-2. Og sum skilst á lagnum, so var talan eisini um ein uppibornan sigur. Fyrsta settið var tað annars Mjølnir, sum trýsti á, men tá ÍF so fótaði sær, tóktist bara at ganga annan vegin. Serstakliga triðja settið var munurin stórur millum liðini, men tá Mjølnir so kortini svaraði aftur, kom av álvara lív í áskoðarafjøldina.

Í avgerandi settinum var kanska væntandi, at tað skulid gerast Mjølnir, sum dróg longra stráðið. Liðið telir fleiri av royndastu leikarunum í landinum, og tær hava áður víst, at tær megna at standa ímóti trýstinum, tá aðrar mugu gevast, men so varð tó ikki hesaferð.

ÍF reistist aftur. Við Nikolinu Alter sum stóra smasharanum trýstu tær gestirnar afturá, soleiðis at hesar fyri tað nógva vóru í verjustøðu, og við einum tryggum 15-9 sigri í javnbrótarunum, skutu tær FM-stríðið víðopið.

Sigurin hjá ÍF ber nevnliga ikki bara við sær, at ÍF nú er aftur í hitanum. Tað eru meistararnir av Tvøroyri eisini. Tær sita kanska við sterkastu kortunum í hondunum, nú tær eiga heimadystir móti bæði ÍF og Mjølni til góðar, men hinvegni hevur ÍF enn ikki tapt landskappingardyst fyri TB í ár.

Hvussu verður og ikki, tykist í øllum førum púrasta vónleyst at gita í løtuni. Men eitt er víst, og tað er, at tey bæði komandi vikuskiftini verða av tí heilt spennandi slagnum. Bæði fyri føroyskan flogbólt sum heild, og ikki minst fyri leikararnar á teimum trimum oddaliðunum.

Fleyr-TB 0-3 (11-25, 21-25, 24-26)

# TB hongur í

**TB uppfylti sínar treytir, tá tær vunnu trygt í Havn, og við úrslitinum á Kambsdali eru steypavinnararnir nú aftur við í gulldystinum**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Síðani TB tapti útidystin móti Mjølni fyrr í endaspælinum, hava treytirnar hjá verandi meistarunum verið púrasta greiðar. Fyrst og fremst skuldu tær syrgja fyri at vinna sínar egnu dystir, og so máttu tær bara vóna, at ÍF megnaði at koppa Mjølni, tá hesi liðini hittust á Kambsdali.

Um vikuskiftið vitjaði TB í Havn, og har megnaði Fleyr ikki at geva teimum stórvegis mót-støðu. Serstakliga fyrsta settið var talan um avgreiðslu-spurning, og tó at Fleyr mutaði nakað ímóti í øðrum setti, so tóktist alt avgjørt, tá TB eisini tók hetta. Helst hildu tvøragenturnar tað sama, tí í øllum førum var um reppið, at Fleyr tók tær á bóli í triðja settinum. Somikið langt kom tað tó ikki, men avrikið hjá Fleyr her vísti tó, at tær kanska eru um at finna stevið aftur. Og tó at hetta ikki røkkur til nakað í ár, so man tað tó kennast hugaligt, um árið hevur kastað nakað av lærdómi av sær.

### Við aftur

Og so var tað eisini so, at TB fekk næstu treyt sína uppfylta um vikuskiftið. Sigurin hjá ÍF á Mjølni ber við sær, at TB nú stendur við avgerðini í gullstríðnum. Verandi meistararnir hava nú tríggjar heimadystir á rað at enda kappingina við, og teir báðir fyrstu mugu av sonnum metast sum alt ella einki dystir. Fyrst kemur ÍF á vitjan og síðani Mjølnir. Vinnur TB hesar dystirnar, so eru tær aftur fremstar í kvinnudeildini, og so kann gullið staðfestast í seinasta heimadystinum, sum verður ímóti Drátti. Men fyrst skulu tær altso taka hini bæði oddaliðini.